# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*4. juli 1957 koyrdi tann fyrsti Fiat 500 av verksmiðjuni í Torino*

# Nýggjur Fiat 500 í "retro-stíli"



*4. juli 2007 verður hesin nýggi Fiat 500 presenteraður í Torino, júst 50 ár eftir at fyrsti Fiat 500 fór av samlibandinum í 1957*



*Niðurteljingin til presentatiónina av nýggja Fiat 500 er av álvara byrjað.*



*Fiat 500 kemur á marknaðin um ársskiftið*



*Nýggi Fiat 500 innan – í sama stíli sum forgangarin*

**Mikudagin 4. juli 2007 verður ein heilt nýggjur Fiat 500 presenteraður í Torino, júst 50 ár eftir at fyrsti Fiat 500 koyrdi av verksmiðjuni í Torino 4. juli 1957.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Niðurteljingin til presentatiónina av nýggja Fiat 500 er av álvara byrjað, og Fiat almannakunngera nú myndir av bilinum, sum Fiat 500-fjepparar um allan heim leingi hava bíða eftir.

Tað var 4. juli í 1957 at tann fyrsti Fiat 500 koyrdi av verksmiðjuni í Torino.

Tá í tíðini var bilurin ímyndin av stórheitstíðini hjá Fiat eftir annan heimsbardaga.

Seinnu árini hevur Fiat 500 fingið "ikonstatus" um stóran part av heiminum.

Hóast nýggi Fiat 500 líkist sínum forgangara frá 50-unum, setur hann heilt nýggjan standard fyri smáar bilar bæði innan trygd, teknologi og útgerð.

Bilurin er 355 cm langur, 165 cm breiður og 149 cm høgur, og aksilfrástøðan er 230 cm.

Tríggir ymiskir motorar verða at velja ímillum, tveir bensin og ein diesel. Bensinmotorarnir eru: 1.2 litur (8v) við 69 hk og ein 1.4 litur (16v) við100 hk, og dieselmotorurin er ein 1.3 litur (16v) Mulijet við 75 hk. Bilarnir fara at fáast við bæði 5 og 6-trins girkassum.

Fyri at markera 50 ára hátíðarhaldið verður Fiat 500 presenteraður alment tann 4. juli 2007 í Torino í Italia. Bilurin kemur á danska marknaðin um ársskiftið.

Fiat 500 verður ein „retrobilur" eins og t.d. Mini Cooper, VW New Beetle og Ford Mustang.

